Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Eyðgunn Samuelsen, løgtingsmaður

Svarari: Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, landsstýrismaður í almannamálum

Evni: Barnavernd

Spurningar:

1. Heldur landsstýrismaðurin, at ásetingarnar um regluligar metingar hjá barnaverndarnevndini sambært § 24, stk. 1 í barnaverndarlógini verða fylgdar?
2. Um ikki, kann landsstýrismaðurin so greiða frá, hvørjar orsakir kunnu vera til tess?
3. Hvussu nógv mál um umsorganaryvirtøku eru sett úr gildi sambært § 24 stk. 2 í barnaverndarlógini seinastu 10 árini?

Viðmerkingar:

Barnaverndarstova Føroya ger á hvørjum ári hagtalsfrágreiðingar, har til ber at síggja, hvussu nógv barnaverndarmál hava verið fyri hvørt ár býtt á m.a. kyn og bústað. Nýggjastu almennu tølini eru frá 2019; tá vóru 920 barnaverndarmál virkin kring landið. Tá talan er um virkin barnaverndarmál, er umráðandi at hava í huga, at tað kann vera alt frá vanligari ráðgeving til mál, har børn verða sett heiman ímóti viljanum hjá foreldrunum, altso umsorgarnaryvirtøka uttan samtykki. Í 2019 vórðu tað skrásett 337 nýggj barnaverndarmál og 221 mál endaðu. Men av tí at málini eru so ymisk ber ikki til at avlesa í tølunum, hvussu nógv av hesum eru børn, sum verða sett heiman, og hvørjar orsakir eru til, at málini enda.

Í § 24 stk. 1 og 2 er ásett, at viðvíkjandi fyriskipanum um umsorganaryvirtøku, har talan t.d. er um vanrøkt av dagligu umsorganini, skal barnaverndarnevndin við jøvnum millumbilum meta um, hvørt umstøðurnar hjá tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan, eru broyttar soleiðis, at barnið aftur kann fáa nøktandi umsorgan í heiminum. Barnaverndarnevndin skal síðani leggja hesa eftirmetingina fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina, og metir Høvuðsbarnaverndarnevndin, at umstøðurnar eru broyttar, soleiðis at barnið aftur kann fáa nøktandi umsorgan í heiminum, skal Høvuðsbarnaverndarnevndin seta avgerðina um umsorganaryvirtøku úr gildi.

Áhugavert er at fáa at vita, um barnaverndarnevndin ger hesar eftirmetingar við jøvnum millumbilum, hvørjar umstøðurnar hjá barnaverndarnevndini eru til at gera eftirmetingarnar til fulnar, og í hvønn mun vit síggja, at mál um umsorganaryvirtøku verða slept, tí at mett verður, at umstøðurnar eru broyttar. Til tess at fáa greiðu á hesum verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 26. mars 2021

Eyðgunn Samuelsen